# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kærkomin kommunukós

Nú um dagarnar fekk landsstýrið nýtt álit um framtíðina hjá kommununum í Føroyum. Sera stórt arbeiði er lagt í hetta álit, sum eisini hevur mangar áhugaverdar niðurstøður. Høvuðstilmælið er greitt: Føroyar skulu í framtíðini bara hava millum 7 og 9 kommunur ella kommunueindir. Hetta er greið tala og í tráð við tað, sum m.a. undanfarni formaðurin í Búskaparráðnum, Jørn Astrup Hansen endaði nærum hvørja talu og grein sína við. Og mong eru helst tey, sum eru samd við hesi niðurstøðu.

Vit hava leingi havt meira enn 50 kommunur í hesum lítla oyggjalandi. Tær hava so uttan iva tænt sínum endamáli og tørvi, og eru ein orsøkin til, at nógv menning er farin fram kring alt landið. Tað hava summi mett sum eina styrki, meðan onnur hava hildið tað vera tað reina galimatias. Torført er at broyta nakað so fastgrógvið sum eina aldargamla kommunuskipan. Tað hava fyrrverandi og núverandi politikarar sannað. Tó so at tíðarandin kortini hevur megnað at fáa talið niður á umleið 30 kommunur. Nú er spurrningurin, hvussu vit koma niður á tað magiska talið uppá sjey ella fyri tað nýggju kommunueindir.

Við øllum afturvendandi prátinum um at flyta stór málsøki so sum skúla og eldraøki út til kommunurnar at umsita er eisini komin meira ferð á ynskið um at fækka talið á kommunum. Til ber nevniliga ikki at varðveita allar tær mongu smærri kommunurnar og samtíðis tilrættaleggja soleiðis, at skúlin og eldraøkið verða flutt til kommunurnar at umsita. Fortreytin fyri einum slíkum útviklingi eru størri eindir. Tað var tann tíð, tá tað var ein sjálvfylgja og ein styrki at varðveita eitt nú skúlan í lokalumhvørvinum. Men fíggjarliga er als eingin meining í tí longur. Eisini er infrakervið so nógv útbygt, at tað eigur ikki at vera nakar trupulleiki at fara í skúla í grannabygdini.

Tað er tí hugaligur lesnaður, tá seinasti arbeiðsbólkurin, kemur til eina so greiða og skilagóða niðurstøðu. Og hann skjýtur eisini upp at halda kommunuval aftur í 2010. Til ta tíð má so vera púra greitt, hvat politikararnir vilja og ætla.

Hetta málið hevur verið frammi aftur og aftur, og sum heild hevur verið semja um at hava færri kommunur. Frá politiskari síðu varð tí avgjørt at seta kommunum krav um samanlegging gjøgnum fólkaatkvøðu. Hetta hevði við sær, at talið á kommunum minkaði nógv men ikki nóg nógv. Nú skal so seinasta takið takast, og vónandi megna okkara politikarar at brúka seinasta tilmælið til nakað ítøkiligt. Einar framtíðar Føroyar og komandi ættarlið hava krav uppá, at landsins tilfeingi verður troytt og brúkt á skilabesta hátt. Vit eru so fá, at eindirnar, tað verið so kommunur, skúlar og aðrir stovnar mugu gerast størri. Skilagóð og væltilrættaløgd rationalisering og effektivisering mugu gerast ein størri og meira náttúrligur partur av samfelagsmenningini – á flestøllum økjum.

**Sosialurin**

Sambinding av Føroyum er alneyðugt at halda fram:

## Undanstøkkingar politikkur



**BIRGIR MOHR**
Sandi

Hetta er tann reini og skeivi armóðspolitikkur, sum samgongan ætlar at føra, og hon greiðir ikki eingang at halda sítt egna samgonguskjal? Eg veit ikki, hør tekur undir við Jóannesi Eidesgaard og Eyðgunn Samuelsen í landsstýri og á løgtingi í teirra armóðspolitikki: bara Alma fær nokk at gjara út við, so eru føroyingar bjargaðir! Men eg haldi, at tað er ikki so, einki land ella fólk livir bara av almannaveitingum?

Tykkara politikkur hevur beint fyri útoyggjunum. Tykkara politikkur røkkur bert til Tórshavnar og nærmasta umhvørvið, soleiðis at bæði norðast í Føroyum, men einamest sunnanfyri, doyggja Føroyar út.

Sandoyggin verður avfólkað innan fyri heilt fá ártíggjur, og tað tekur kanska eitt sindur longri at avfólka Suðuroynna.

Allur útviklingur í Føroyum er uppsteðgaður sunnan fyri Skopunarfjørð? Hví? Tí alt er í og rundan um Tórshavn, og tað má kanska vera so, men so eiga vit onnur at sleppa til Havnar á best møguligan hátt. Men so er ikki, tí tit unna ikki okkum eitt fast samband, hóast tit til hvørt val við lóg og í samgongu-skjali hava lovað okkum hetta sum fyrsta stig á suðurleiðini. Og nú loypa tit frá. Einaferð enn støkka tit undan tykkum sjálvum???

Fyrst vóru tíðirnar ov góðar, so ikki kundi byrjast. So fekk Tjóðveldið skyldina, meðan nú kom tað eftir øllum at døma fram, at Javnaðarflokkurin hevur onki meint við sínum lovorðum til suður Føroyar, har hann hann hevur átt flestu atkvøðurnar ???

Verða eingir pengar avsettir sambært samgonguskjalinum til Sandoyartunnil, og verður felagið til endamálið ikki stovnað nú, so kunnu vit bert staðfesta, at hetta er undanstøkkingar-politikkur, sum samgongan førir. So langt fór javnaðarflokkurin.

Var tað ikki ein løg-maður, sum segði í seinasta mánaða í fjølmiðlunum, at so leingi hann var løgmaður, skuldi samgonguskjalið haldast??? Meinti tú tað ikki?

Fyrst vóru tíðirnar ov góðar – so vóru tað hini, sum ikki vildu – nú eru tíðirnar ov ringar – eg byrji nú at skammast yvir flokk mín – javnaðarflokkin.

Takið tykkum saman, ella leggið frá tykkum.

## Altjóða dagur móti fosturtøku?

**TÓRI HØJGAARD**

10. okt. var Altjóða dagur móti deyðarevsing. Fyrr í ár gav Amnesty International út frágreiðingina ”Death sentences and executions in 2008”. Sambært frágreiðingini vóru í minsta lagi 2390 fólk tikin av døgum og 8864 vóru dømd til deyða. Verðuliga talið av deyðarevsingum er heilt vist hægri, men av tí at fleiri lond halda sínar avrættingar loyniligar, er óvist, hvussu høgt veruliga talið er.

Frágreiðingin er ein liður í arbeiðinum hjá Amnesty móti deyðarevsing – ein revsing ið felagskapurin sigur vera brot á rættin til lív.

Sjálvt um tað er bæði syrgiligt og meir enn bara eitt sindur ræðandi, at tað enn eru lond, ið finna uppá at drepa sínar egnu borgarar, so eru altjóða fosturtøku tølini nógv meira ræðandi. Tað alt ov høga talið av avrættingum er bert ein dropi í havinum samanborið við talið av fosturtøkum. Eisini er vert at hava í huga, at sjálvt um ein stórur partur av teimun deyðadømdu ikki á nakran hátt hava framt eitt lógarbrot, sum stendur í mát við revsingina, so eru tað alíkavæl fleiri deyðadømd, sum hava framt sera grovar illgerðir. Tey børn, ið árliga vera týnd, hava hinvegin onki skeivt gjørt yvirhøvur. Lívið verður tikið frá teimun, áðrenn tað veruliga er byrja.

Av tí at fosturtøkutølini úr teimun ymisku londunum ikki altíð eru líka løtt at fáa hendur á, so er eins og við deyðarevsingunum eitt sindur ilt at finna eitt neyvt tal. Men mett verður, at umleið 40.000.000 fosturtøkur verða framdar **um árið**. Tað vil siga at seinastu 10 árini eru næstan ein hálv milliard børn noktaði rættin til lívið. Til samanberingar kann nevnast, at seinni heimsbardagi, ið byrjaði í 1939, og endaði í 1945, kostaði áleið 50 mió fólkum lívið. Í meðan jødatýningin, ið er tað grovasta dømi um hópmorð í søguni, kostaði 6 mió. fólkum lívið. Bara í Danmark verða 15.000 fosturtøkur framdar árliga.

Slík ógvuslig tøl kunnu vera sera torfør at fáast við. Tað eru nokk fá av okkum, ið klára at ímynda sær hvussu nógv 40 mió. veruliga er - men tað er heldur ikki neyðugt fyri at fáa eina fatan av sorgarleikinum. Gakk ein túr framvið einum barnagarði. Úti í garinum spæla kanska eini 15-20 børn. Ímynda tær at onkur týndi tey øll. Ella bara eitt av teimun!

Nú skal hetta lesarabrævið ikki skiljast sum eitt álop á Altjóða dagin móti deyðarevsing. Tað er neyðugt at fólk verða mint á órættin, ið verður framdur kring allan heim. Men eg helt, at tað var líka so neyðugt at minna fólk á allar tær deyðarevsingarnar ið vit kortini velja at góðtaka, við tí vón um at fólk far eyguni upp fyri tí ræðandi veruleikanum. Vónandi verður fosturtøka ein dag líka politiskt ókorrekt, sum deyðarevsing tíbetur er vorin í einum stórum og vaksandi parti av heiminum.

Ella skulu vit halda áfram at verða ímóti einum slagi av deyðarevsing, í meðan vit góðtaka eitt annað nógv meira umfatandi slag av deyðarevsing?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.